num enn í Europa, hava tikið seg fram, og broytingarnar hjá Føroyum hava ikki verið serliga stórar tey bæði seinastu árini.

Eyðkennið fyri triðja ættarliðið av landsliðsspælarum og teimum, sum síðani eru komnir afturat, er, at teir ikki hava kent til annað, enn at Føroyar hava luttikið í undankappingum, og at teir hava havt møguleika fyri altjóða royndum frá tí at teir hava verið 15-16 ára gamlir.

Í hesum ættarliðnum eru Fróði Benjaminsen, Rógvi Jacobsen, Claus Bech Jørgensen, Jón Rói Jacobsen, Súni Olsen og Jákup á Borg, sum hava verið sjálvskrivaðir millum teir fyrstu ellivu í fleiri ár og harvið mugu roknast at vera stuðulsspælarar, og so Atli Danielsen, Heðin á Lakjuni, Christian Høgni Jacobsen og Andrew av Fløtum, sum hava verið við so mikið ofta, at teir vita, hvat tað snýr seg um. Millum hesar eiga eisini at verða nevndir Hjalgrím Elttør og Jann Ingi Petersen, sum vóru í landsliðshitanum, og sum nú fara at stríðast fyri at koma aftur hagar, eftir at uppihaldið í Keypmannahavn í fjør hevði við sær, at teir vórðu settir longri aftur í røðina.

Skálamenninir Jónhard Frederiksberg, Arnhold Berg og Pauli G. Hansen hava saman við HB spælarunum Kára Nielsen og Vagnur Mohr Mortensen verið í hitanum, og so eru tað uppaftur yngri spælarar, sum kunnu roknast at hoyra til fjórða ættarliðið. Her verður hugsað um Inga Højsted, sum í B36 skal koma fyri seg aftur, og sum - um hann fer at fáa landsliðsmøguleikan - kann nýta tað høvið at vísa, at tað er dugur í honum í altjóða høpi, eisini verður hugsað um Símun Samuelsen hjá VB, og ivaleyst kundu fleiri aðrir eisini verið nevndir. Eitt nú teir meiri og minni eyðsýndu framtíðar landsliðsspælararnir, sum vóru við á venjingarleguni í La Manga fyrr í ár, og so Gunnar Nielsen og Jónas Þór Næs í Frem og teir uppaftur yngri Christian R. Mouritsen og Jóhan Troest Davidsen í Onglandi.

## Tyngdin heimeftir

Tað verður tungt og torført støðugt at lyfta Føroyum fram á styrkislistanum. Longri landskapping hevur verið roknaður sum ein heilivágur. Hetta stigið verður tikið í ár, men tað fer neyvan at kennast aftur beinavegin. Ein annar máti at røkka tí málinum hevur verið hildin at vera fleiri landsliðsspælarar í útlendskum feløgum. Her er skjótt at staðfesta, at tað leingi hevur staðið í stað ella kanska gingið skeiva vegin.

Fyri 3-5 árum síðani kom tað fleiri ferðir fyri, at fleiri spælarar í átjan manna landsliðshópinum vóru úr útlendskum feløgum, enn tað vóru úr føroyskum feløgum. Nú tað verður farið undir seinna árið í HM undankappingini, ið hevur sum mál at finna fram til, hvørjir luttakararnir skulu vera í endaspælinum í Týsklandi næsta summar, eru sjey møguligir útisetar á landsliðnum. Teir eru Todi Jónsson, Jón Rói Jacobsen, Claus Bech Jørgensen, Andrew av Fløtum, Rógvi Jacobsen, Hans Fróði Hansen og Johan B. Hansen. John Petersen spælir í triðju bestu deildini í Danmark. Hann hevur boðað frá, at hann nú er fyrrverandi landsliðsspælari. Men nú hava vit nevnt hann, og harvið er hann ikki gloymdur!

At fleiri útisetar eru á liðnum hevur ikki altíð av sær sjálvum havt við sær, at liðið er vorðið betri. Eitt nú hevur tað ikki víst seg at verið sjálvsagdur styrkur, at spælarar úr næstbestu donsku deildini hava verið á liðnum, og royndirnar hava heldur ikki víst, at spælarar, ið eru fluttir úr bestu føroysku deildini og í bestu íslendsku deildina eru vornir betri fótbóltsspælarar og harvið stinnari umboð fyri Føroyar.

Men tá ið alt kemur til alt, so sær tað ikki so galið út. Javnvágin millum eldri og yngri spælarar og teir heima á landi og í útlandinum er ikki so galin, og avbjóðingunum bilar einki. Sveis, Ísrael, Írland og Kypros á heimavølli og Frakland í París og Ísrael í brennideplinum í Miðeystri er ikki so galið, sum maðurin plagar at taka til.



*Jens Martin Knudsen er tann einasti, ið er eftir av sekstan manna liðnum, sum í 1988 spældi fyrsta altjóða skrásetta landsdystin í Akranesi 8. august í 1988*

# Okkara bólkur

Ikki óvæntað eru Føroyar higartil á aftasta plássinum í okkara undankapingarbólki. Men fyrsta stigið er longu komið til høldar, og møguliga kann støðan broytast, tá Cypros kemur á vitjan hjá okkum tann 17. august í ár.

**Úrslit**

| | | |
|---|---|---|
| 04.09.04 | Írland-Cypros | 3-0 (2-0) |
| 04.09.04 | Sveis-Føroyar | 6-0 (4-0) |
| 04.09.04 | Frakland-Ísrael | 0-0 |
| 08.09.04 | Føroyar-Frakland | 0-2 (0-1) |
| 08.09.04 | Sveis-Írland | 1-1 (1-1) |
| 08.09.04 | Ísrael-Cypern | 2-1 (0-0) |
| 09.10.04 | Cypros-Føroyar | 2-2 (1-2) |
| 09.10.04 | Ísrael-Sveis | 2-2 (1-2) |
| 09.10.04 | Frakland-Írland | 0-0 |
| 13.10.04 | Írland-Føroyar | 2-0 (2-0) |
| 13.10.04 | Frakland-Cypros | 0-2 (0-1) |
| 17.11.04 | Cypros-Ísrael | 1-2 (1-1) |

**Støðan**

| Land | d | v | j | t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Írland | 4 | 2 | 2 | 0 | 6-1 | 8 |
| Frakland | 4 | 2 | 2 | 0 | 4-0 | 8 |
| Ísrael | 4 | 2 | 2 | 0 | 6-4 | 8 |
| Sveis | 3 | 1 | 2 | 0 | 9-3 | 5 |
| Cypros | 5 | 0 | 1 | 4 | 4-11 | 1 |
| Føroyar | 4 | 0 | 1 | 3 | 2-12 | 1 |

**Komandi dystir**

| | |
|---|---|
| 26.03.05 | Ísrael-Írland |
| 26.03.05 | Frakland-Sveis |
| 30.03.05 | Sveis-Cypros |
| 30.03.05 | Ísrael-Frakland |
| 04.06.05 | Føroyar-Sveis |
| 04.06.05 | Írland-Ísrael |
| 08.06.05 | Føroyar-Írland |
| 17.08.05 | Føroyar-Cypros |
| 03.09.05 | Frakland-Føroyar |
| 03.09.05 | Sveis-Ísrael |
| 07.09.05 | Cypros-Sveis |
| 07.09.05 | Føroyar-Ísrael |
| 07.09.05 | Írland-Frakland |
| 08.10.05 | Cypros-Ísrael |
| 08.10.05 | Ísrael-Føroyar |
| 08.10.05 | Sveis-Frakland |
| 12.10.05 | Frakland-Cypros |
| 12.10.05 | Írland-Sveis |

**Málskjúttar**

| | |
|---|---|
| Johan Vonlanthen, Sveis | 4 |
| Robbie Keane, Írland | 3 |
| Yossi Benayoun, Ísrael | 3 |
| Alaxandre Rey, Sveis | 3 |
| Michael Konstantionou, Cypros | 2 |
| Ioannis Okkas, Cypros | 2 |
| Clinton Morrison, Írland | 2 |
| Valeed Badeer, Ísrael | 1 |
| Adoram Keisi, Ísrael | 1 |
| Avi Nimni, Ísrael | 1 |
| Ludovic Giuly, Frakland | 1 |
| Djibril Cisse, Frakland | 1 |
| Sylvain Wiltord, Frakland | 1 |
| Thierry Henry, Frakland | 1 |
| Claus Bech Jørgensen, Føroyar | 1 |
| Rógvi Jacobsen, Føroyar | 1 |
| Andy Reid, Írland | 1 |
| Alaxandar Rey, Sveis | 1 |
| Hakan Yakin, Sveis | 1 |